# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Realskúlaflokkur í 1916



Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í fjør. Realskúlaflokkur í 1916.

**Aftasta rað f.v.:** Marni ? (Danmark), Anton Djurhuus (Kollafjørður), Knud Nygaard, Martin Djurhuus og Evald Arge.

**Fremra rað f.v.:** Jacob Jacobsen, Haraldina (Vestmanna) (gift til Hoyvíkar), Lina á Lag, Tórshavn, og Jørgen Frants Jacobsen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 106).

*Myndaeigari: Lis Rasmussen*

## MC Boogie 3. mai



Leygardagin 3. mai, á Krossmessu, verður tann árligi felagstúrurin MC Boogie, ið er fyri øll motorsúkkluáhugaði í Føroyum.

Sum vant er tað Føroya MC, ið skipar túrinum á vári, meðan tað er Føroya Ellisakfar, ið skipar fyri honum á heysti. Hesir báðir túrarnir plaga at markera ávíkavist byrjanina og endan á motorsúkkluárinum, og plaga at vera sera hugnaligir.

Møtt verður á Shellstøðini við Ringvegin í Havn kl. 10 til ein kaffimunn og okkurt gott afturvið. Einar 100 motorsúkklur plaga at vera við á túrinum, og um 11-tíðina byrjar felagstúrurin. Koyrt verður fyrst ein túr runt í Havn, og síðani gongur leiðin norður eftir Sundalagnum. Steðgað verður eina løtu við Shellstøðina við Streymin, og eftir ein lítlan steðg, gongur leiðin norður til Eiðis, upp um Eiðisskarð, til Funningsfjørð, og suður aftur gjøgnum Sundalagið. Koyrt verður síðani gjøgnum undirsjóvartunnilin til Vágar og til Sørvágs, har vent verður. Við Vága kunningarstovu í Miðvági verður ein langur steðgur.

Á kunningarstovuni fæst kaffi og tilíkt, og ymiskar kappingar verða á staðnum, sum t.d. togtogan, slalomkoyring og sniglakoyring, har vinnarin fær eitt steyp handað.

Kl. 19 verður veitsla í felagshúsinum á Velbastaðvegnum í Havn. Tilmelding til veitsluna á tlf. 211072, áðrenn mikudagin 30. apríl. Øll eru vælkomin.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Hertha Poulsen**, ættað av Tvøroyri, búsitandi á Sandi, andaðist á Landsjúkrahúsinum 26. apríl, 77 ára gomul. Farið verður úr kapellinum mánadagin 28. apríl kl 16. Jarðarferðin verður tysdagin 29. apríl kl 13 úr Sands kirkju. Sungið verður úr sálmabókini.

**Kristina Tallman**, dóttir Jákup í Glasstovuni í Klaksvík, andaðist í New Hampshire, 26. apríl, 91 ára gomul.

**Sverri Sofus á Garðsendanum frá Norðskála**, ættaður av Slættanesi, andaðist leygardagin 26. apríl á Mørkini í Streymnesi, 78 ára gamal.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða mamma, svigarmamma, omma og langomma

**Katrin Jovina Skarðhamar**
vanliga nevnd Katrin

andaðist 27. apríl í Herborg á Jútlandi, 60 ára gomul.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna*
**Heðin, Eyðvør, Sven, Sólfríð og Ingibjørg**

**Dagurin**
**29. apríl. Pætur blóðvitnismaður,** deyður í 1252. Dagurin hevur navn eftir einum dominikanamunki, sum varð myrdur av fíggindum í Milano.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!